# Gaddafi – einaræðisharrin úr oyðimørkini

**ÚTLOND** Leiðarin í Libya, Muammar al-Gaddafi, er hvørki forseti, forsætisráðharri ella generalur. Ístaðin fyri hevur hann valt sær onnur heiti. Eitt teirra er "Vegleiðari fyri teirri stóru 1. september-kollveltingini í tí libyska lýðveldinum". Men hann røkir øll tey vanligu ovastu embætini í einum landi og er tí einaræðisharri

Árni Joensen

Í Vesturheiminum er Muammar Gaddafi kanska best kendur sum tann einasti ríkisleiðarin, sum hevur sítt egna tjald ella rættari sagt sína egnu tjaldlegu við sær, tá hann er á ferð uttanlands. Vanliga er hann millum luttakararnar á árliga aðalfundinum hjá ST, og tá hevur hann sett tjaldleguna upp mitt í New York.

Libyski einaræðisharrin er lívsnjótari. Tá hann seinast var í Italia og vitjaði vinmannin Silvio Berlusconi, hevði hann fylt tjaldleguna við ungum ljóshærdum kvinnum, sum ikki vóru í meiri klæðum enn neyðugt. Tey, sum fylgdu við, vildu vera við, at kvinnurnar høvdu fingið pengar frá Gaddafi aftur fyri at taka við islamskari trúgv.

Mong munnu hava sæð, at Gaddafi ofta hevur eina prúða kvinnu undir liðini á sær, tá hann er á ferð. Skjøl hjá Wikileaks hava avdúkað, at tann ljóshærda og bringustóra kvinnan er úr Ukraina, og at hon er sjúkrarøktarfrøðingur.

### Við harðari hond

Tey, sum kenna Muammar Gaddafi, siga, at hann kann gott vera bæði hugnaligur og skemtiligur, men tann, sum setir seg upp ímóti honum, fær skjótt eina aðra mynd av manninum úr oyðimørkini.

Tí aftan fyri tann hugnaliga og skemtiliga gekkaskortin er ein einaræðisharri, sum stýrir sínum landi og fólki við beinharðari hond. Allir politiskir flokkar, sum ikki hava somu stevnuskrá sum einaræðisharrin sjálvur, eru bannaðir. Fleiri hundrað politiskir andstøðingar sita í fongsli, og fleiri teirra hava fingið deyðadóm. Píning er vanlig, og tað hendir meiri enn so, at fólk, sum hava eina aðra uppfatan enn leiðarin, hvørva.

– Teir flestu, sum høvdu sagt og gjørt sum Muammar Gaddafi, høvdu verið umrøddir sum svikaligir og óstøðugir, men libyski leiðarin er ein samansettur persónur, sum hevur megnað at varðveita valdið í 40 ár, stóð í amerikonskum diplomatskjølum, sum Wikileaks hevur almannakunngjørt.

### Lívsseigur

Síðani Muammar Gaddafi tók valdið við eitt hernaðarkvett í 1969, hevur hann stýrt Libya við harðari hond. Í dag er landið eitt av teimum mest avbyrgdu í Afrika og í tí arabiska heiminum. Tá Omar Bongu, sum var einaræðisharri í Gabon, doyði fyri tveimum árum síðani, yvirtók Gaddafi heiðurin sum tann mest lívsseigi einaræðisharrin í Afrika, tí eingin hevur sitið við valdið so leingi sum hann. Í veruleikanum eru tað fáir einaræðisharrar í søguni, sum hava sitið so leingi við valdið sum libyski leiðarin.

Men okkurt bendir á, at hansara dagar á teirri trúnuni fara at fækka. Mótmælis- og uppreistraraldan, sum tók seg upp Tunesia og legði seg inn yvir Egyptaland, skolar nú eisini inn yvir Libya og tess 6,5 milliónir íbúgvar.

Í Tunesia noyddist Zine al-Abedine Ben Ali at taka til rýmingar, og í hølunum á honum fór Hosni Mubarak úr Kairo. Spurningurin er, um Gaddafi verður tann næsti.

### Oyðimarkarsonur

Muammar Gaddafi varð borin í heim millum nomadufólkið nærhendis býnum Sirte. Hann hevur ofta umrøtt seg sjálvan sum oyðimarkarson, og tey, sum hava verið saman við honum, siga, at hann framvegis kennir seg sum ættarleiðara úr Sahara-oyðimørkini.

Gaddafi var heppin at fáa skúlagongd og fekk seinni útbúgving sum løgfrøðingur og bretska hernaðarútbúgving. Í 1969 stóð hann á odda fyri einum hernaðarkvetti. Hann bleiv forsætisráðharri, men tað heitið hóvaði honum ikki, so í 1972 segði hann heitið frá sær, tí í hansara eygum er tað fólkið, sum stýrir Libya.

Einaræðisharrin úr oyðimørkini hevði ein dreym um at gerast tann arabiski Che Guevara. Hann læt Libya upp fyri yvirgangsmonnum og skrivaði sína egnu "grønu bók", sum hevði ta "lítlu reyðu" hjá Mao sum fyrimynd.

Hugsjónarliga var Gaddafi ein samanrenning av islamismu og kommunismu. Hann hevði ein dreym um eina stóra arabiska samgongu og royndi fleiri ferðir at fáa Egyptaland, Tunesia og Sýrialand at skipa eina tílíka samgongu saman við Libya, men til fánýtis.

### Fíggindi

Sum nevnt hevði Mummar Gaddafi tætt samband við yvirgangsfelagsskapir, og tað gjørdi, at upp í gjøgnum sjeytiog áttatiárini gjørdist hann ein tann ringasti fíggindin hjá Vesturheiminum. Hann stuðlaði fleiri yvirgangsfelagsskapir um allan heimin fíggjarliga, og millum annað var hann dyggur stuðul hjá tí illa gitna felagsskapinum Svarti September, sum leyp á ísraelsku ítróttarfólkini á olympisku leikunum í München í 1972 og myrdi fleiri teirra.

Gaddafi varð eisini settur í samband við eina bumbuatsókn at einum diskoteki í Berlin í 1986, har nógvir amerikanskir hermenn vóru inni. Tann mest umrødda yvirgangsatsóknin, sum verður sett í samband við hansara navn, var upp undir jól í 1988, tá eitt amerikanskt ferðamannaflogfar sprongdist uppi yvir skotsku bygdini Lockerbie.

### Fingið góðkenning

Leikluturin hjá Libya og tess leiðara í altjóða yvirgangi høvdu við sær, at umheimurin og serliga USA setti eina røð av tiltøkum í verk ímóti landinum. Men í 1999 valdi Gaddafi at átaka sær ábyrgd av ymsum yvirgangsatsóknum ímóti málum í Vesturheiminum og at rinda endurgjald, og tað gjørdi, at tey flestu tiltøkini ímóti Libya vórðu sett úr gildi.

Árini síðani hevur Gaddafi fingið eitt slag av viðurkenning í Vesturheiminum, og hesi árini hevur hann hitt fleiri av teimum fremstu ríkis- og stjórnarleiðarunum so sum Tony Blair, Nicolas Sarkozy, Barack Obama og Silvio Berlusconi, sum - kanska ikki so óvæntað - verður roknaður sum hansara besti vinur vestanfyri.

Tey seinastu árini hevur Muammar Gaddafi lagt seg eftir at fyrireika sonin Seif al-Islam al-Gaddafi til at taka við eftir seg. Men mótmælisfólkini í gøtunum í Benghazi, Tobruk, Tripoli og aðrastaðni kunnu leggja fót fyri ætlan hansara og noyða hann at fara aftan á Ben Ali og Mubarak, skrivar AFP.

*arni@sosialurin.fo*



*Muammar Gaddafi hevur stýrt Libya í skjótt 42 ár, og tað eru fáir einaræðisharrar í søguni, sum hava sitið við valdið so leingi sum hann.*
Mynd: Reuters

## Fakta

### Muammar Gaddafi

Oberstur og leiðari í Libya.
Føddur í býnum Sirte i 1942.
Útbúgvin løgfrøðingur og heryvirmaður.
Tók valdið í Libya við einum hernaðarkvetti í 1969, setti kongsveldið úr gildi og skipaði Libyska Arabiska Lýðveldið.
Stýrislagið byggir á eina hugsjón, sum samantvinnar arabiska tjóðskaparkenslu og vælferðarsamfelagið við oljuinntøkum sum fíggjarligum grundvølli.
Gaddafi hevur stýðjað yvirgagsfelagsskapir og frælsisrørslur kring allan heimin, men tey seinnu árini hevur hann broytt politikk og hevur fingið betri samband við Vesturheimin.



*Tað var tann tíð, tá hesir báðir hugnaðu sær. Nú er Hosni Mubarak fallin, og Muammar Gaddafi kann fáa somu lagnu*
Mynd: AFP

## Fakta

### Ófriður í Libya

Aftan á kollveltingarnar í Tunesia og Egyptalandi breiddu mótmælini seg til Bahrain, Jemen, Jordan og Libya.
Ófriðurin í Libya hevur havt tað frávik frá hinum londunum, at herurin hevur brúkt bæði skarpskjúttar, flogfør og tyrlur ímóti mótmælisfólkinum.
Fleiri hundrað eru deyð.
Obersturin Mummar Gaddafi hevur havt valdið í Libya síðani hernaðarkollveltingina í 1969. Hann sigur, at tað er fólkið, sum ræður, og tí hevur hann hvørki heiti sum forseti ella generalur.
Gaddafi hevur stýrt Libya við beinharðari hond, og øll andstøða verður kvald.